


*Tróndur í Gøtu er júst komin heimaftur av fyrsta túrinum eftir umvælingar í Litava. Hann landar í løtuni sild á Kollafjørð Pelagic.*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Tróndur í Gøtu landar í Kollafirði

**Tróndur í Gøtu hevur havt eitt heldur friðarligt ár, tí hann hevur verið til umvælingar í Litava stóran part av árinum. Nú er Tróndur júst komin aftur frá sínum fyrsta túri eftir umvælingina.**

FISKISKAPUR
*Teitur Joensen*

Jákup Jacobsen í Gøtu, stjóri á P/F Krossbrekka, sum er partafelagið handan bátar sum Trónd í Gøtu og Finn Fríða, sigur, at árið í ár hevur verið nakað øðrvísi hjá Tróndi í Gøtu, enn vanligt er.

Teir fyrstu mánaðirnar var sum vanligt við góðum fiskiskapi, men tann 22. mai bleiv báturin sigldur til Litava, har tað var neyðugt við nøkrum umvælingum.

### Strika í rokningini

Í samfullar tveir mánaðir lá Tróndur í Gøtu í Litava, har hann var til umvælingar. Báturin bleiv málaður av nýggjum, samstundis sum RSW-tangarnir blivu sandblástir og málaðir. Jákup Jacobsen sigur, at sjálvt um hetta er ein strika í rokningini, so var hetta eitt neyðugt stig at taka. Báturin sá ikki alt ov væl út, og nú tangarnir eru reinsaðir førir tað við sær, at góðskan av fiskinum verður betri, sigur hann. Samstundis er báturin málaður, so hann er sum spilldurnýggjur. So sjálvt um báturin ikki hevur verið í fiskiskapi í tveir mánaðir, so fær ein nakað burturúr í longdini, sigur Jákup Jacobsen.

### Støðugur sildaprísur

Tróndur í Gøtu hevur fyrsta túrin eftir umvælingina verið á sildaveiðu, og tá vit spyrja Jákup um prísin sigur hann, at sildaprísurin hevur verið støðugur í eina tíð. Hann hevur svinga frá 3 kr. til 3,50 kr. Víðari sigur hann, at Tróndur eftir landingina á Kollafirði fer út aftur á sildafiskiskap, men um mánaðarskifti Septembur/Oktobur er makrelurin á skránni. Spurdur um hetta hevur verið eitt gott sildaár, sigur Jákup, at tað hevur tað ikki beinleiðis verið. Tað hevur verið eitt vanligt ár, sigur hann. Prísurin hevur ikki verið hægri enn vanligt, men heldur ikki lægri, samstundis sum tað ikki hevur verið ovurnøgd av sild. Men sum heild er einki komi óvart á okkum, so vit eru heilt væl nøgdir við árið hóast alt, heldur hann.

Ein av hinum bátunum hjá P/F Krossbrekku, Finnur Fríði, landar í løtuni í Hetlandi. Hann hevur eisini verið á sildafiskiskapi og landar hann 850 tons fyri 3,20 kr. kilo.

### Makrelprísurin støðugt hækkandi

Tá ið P/F Krossbrekka fór undir sítt arbeiði fyri nøkrum árum síðani var makrelprísurin heilt niðri á 1,80 kr. kilo. Men síðani tá hevur prísurin verið støðugt hækkandi, og tey síðstu 10 árini er prísurin farin heilt frá 1,80 kr. kilo til 13 kr. kilo. Jákup Jacobsen sigur, at hetta hevur stóran týdning fyri felagið. Tá ið prísurin er so høgur, sum hann er í løtuni, so hevur hetta nógv at siga fyri okkum, heldur Jákup. Hann væntar tó heldur ikki, at makrelprísurin í ár fer at vera hægri enn væntandi, tískil má árið metast at vera eitt vera eitt gott ár hjá okkum, men tó ikki nakað óvanliga gott ár, sigur Jákup. Men treyðugt so, makrelveiðan er ikki byrja, og tískil er ilt at meta um hetta, heldur hann.

### Japanar trýsta prísin upp

Jákup sigur, at vit skulu allan vegin til Japan, fyri at finna grundina til høga makrelprísin. Hann sigur, at eftirspurningurin frá japanarum er so høgur eftir makreli, at prísurin rýkur upp. Síðstu árini hevur stóri eftirspurningurin verið vaksandi úr Japan, og tískil er prísurin so høgur. Hann vónar, at eftirspurningurin frá Japan verður verandi so høgur, tí hetta er ein týdningarmikil keypari hjá felagnum og fyri okkum føroyingar, heldur hann.

### Makrelveiðan bíðar fyri framman

Nú fer sildaárið ella sildafiskiskapurin spakuliga at halla. Sum heild hevur hetta verið eitt gott sildaár, sigur Jákup, meðan hann spentur bíðar eftir makrelinum. Um ein mánað, ella rættari sagt, um mánaðarskifti September/Oktobur, fara Tróndur í Gøtu og Finnur Fríði á makrelveiðu, og tá verður bíða við spenningi fyri at vita, hvussu hetta fer at ganga. Prísurin er høgur og vaksandi, so vit vænta og vóna, at henda gongdin fer at blíva við, sigur Jákup Jacobsen stjóri á P/F Krosbrekka at enda.

# Føroyskur tónleikur klárar seg væl á 15 teimum bestu

**Trý av fýra teimum fremstu løgunum á 15 teimum bestur eru hesa vikuna føroysk.**

NIELS UNI DAM
*nielsuni@sosialurin*

Tað er nakað síðan, at føroyskir bólkar hava átt bæði tey ovastu plássini á 15 teimum bestu. Men hesa vikuna er Gestir bólkurin, ið avbjóðar Sasa Sa, Sa hjá The Dreams, ið aftur hesa vikuna liggur ovast.

Hvørt Fótafet hjá Gestum er somikið vælumtókt millum útvarpslurtararnar, at lagið hesa vikuna hevur skift tað flotta 4. plássið, ið bólkurin kom inn á í síðstu viku við næstovastu rók.

Marius og lagið The Sky Is Our Home liggur á fjórða plássi aftan fyri Boten Anna, ið fyri tveimum vikum síðan skumpaði The Dreams og Sasa Sa, Sa eina viku av ovastu rók.

Graceland hjá 200 á 8. plássi er hitt 4. og seinasta føroyska íkastið á listanum. The Story Ends og lagið Good Intuition er eykalag hesa vikuna, og bólkurin, ið fyrr í ár lá á ovastu rók við lagnum Dancing Around Honolulu, tykist at hava góðan møguleika fyri at sleppa inn á listan. Um øll hini føroysku løgini vera verandi á listanum, merkir hetta, at ein triðingur av listanum er føroyskur.

1 The Dreams / Sasa Sa, Sa
2 Gestir / Hvørt Fótafet
3 BassHunter / Boten Anna
4 Marius / The Sky Is Our Home
5 Nelly Furtado / Maneater
6 Rihanna / Unfaithful
7 Justin Timberlake / SexyBack
8 200 / Graceland
9 Outlandish / I Only Ask Of God
10 Muse / Knights Of Cydonia
11 Gnarls Barkley / Crazy
12 The Rasmus / Sail Away
13 Nik & Jay / Boing
14 Robbie Williams / Rudebox
15 Juanes / La Camisa Negra
(e) Pink / Long Way To Happy
(e) Cassie / Me & U
(e) Red Hot Chili Peppers / Tell Me...
(e) Beyoncé feat. Jay-Z / Déjà Vu
(e) The Story Ends / Good Intuition

# Eyðun og Tróndur á Skarv

Leygarkvøldið leggur føroyska vertshúsið í Keypmannahavn, Skarv pall til Eyðun Nolsøe á kassagittara og sangi og Trónd Enni á bassi og sangi.

Hvør sær, eru teir báðir kendir sum sangarar og tónleikarar. Eyðun Nolsøe, oddamaður í Frændum og sum einstaklingur ella saman við Terja og Tróndur Enni er ein tann besta songrøddin, ið er komin av Tvøroyri seinnu árini.

Tróndur hevur spælt rættiliga nógv í ymiskum samanhangum og sum einstaklingur. Í summar hava hann og Eyðun spælt rættiliga fitt saman í Føroyum. Men grundarlagið í samstarvinum er lagt á Skarv, har teir báðir hava framført saman fýra ferð higartil í ár.

**nud**